# Haldið nú kjaft við jamrinum!

SJÚRÐUR SKAALE



**Friðarboðin má ansa eftir ikki at gera samkynd til láturs**

Tað man mangan vera lítið hugaligt at vera samkyndur í Føroyum. Fordómarnir millum fólk eru nógvir, og fordømingin frá nøkrum av okkara mest ómentaðu politikarum nívir uttan iva eisini.

At tey, sum fordøma mest, ofta gera tað í kristindómsins navni, ger sjálvandi støðuna enn verri hjá samkyndum, sum eru kristin sjálv.

So støðan er ikki góð. Tað er greitt.

Spurningurin er bara, hvat best er at gera við tað. Og tað er ikki so greitt.

**Offurrollan**

Tann, sum er fyri órætti, kann lættliga fara at kenna seg sum eitt offur. Og tá heilt illa vil til, kann tað vera eitt offur gerast sjálvur samleikin hjá viðkomandi. Í staðin fyri at royna at broyta støðuna, verður orkan løgd í at menna og røkja henda nýggja samleikan. Samleikan sum offur.

Tann, sum velir hesa leiðina, broytir einki. At offrini dyrka sína offurrollu gagnar bara teimum, sum fremja óréttin.

Og so sjálvandi teimum "politiskt korrektu", sum altíð eru til reiðar at gera seg til talsfólk fyri offrini, fyri á tann hátt at kenna seg góð og rættvís sjálv.

**Loysingaroffrini**

Tað eru óteljandi dømi um hetta, men í Føroyum kenna vit tað ikki minst frá tí politiska loysingarvonginum. Upp gjøgnum árini hava verið ikki so fáir loysingarmenn, ið hava lagt størri orku í at gremja seg um at danir framdu órætt í 1946, enn at líta frameftir. Teir dyrkaðu sín leiklut sum offur – enntá fleiri áratígggju eftir, at fólkaatkvøðan í 1946 varð hildin.

Henda gremjanin flutti ikki Føroyar eina sponn nærri loysingini. Tí tey, sum taka synd í sær sjálvum, koma sjáldan úr stað. Tey skapa einki uttan eina sterka samkenslu við sær sjálvum.

**Kvalandi grenj**

Samkynd í Føroyum hava farnu árini gjørt fleiri fín átøk. Átøk, sum hava angað av gleði og stoltleika – og sum tí eisini hava flutt mørkini rætta vegin.

Men farnu vikurnar er leiðslan í Friðarboganum dottin so beint í jústa veitina, sum hon ikki má detta í: Tey hava grenjað og gramt seg um, hvussu ræðuliga synd tað er í teimum!

Nógv fólk eru um at kvalast av hesum. Og harvið gevur Friðarboðin øllum samkyndum føroyingum ein samleika, sum er drepandi: Tey samkyndu eru tey, sum tað er synd í! Tey, sum grenja og gráta! Neyðardýrini! Tey forfjónaðu og forfylgdu! Offrini!

Og tey politiskt korrektu hava sjálvandi hjálpt til at skapa hesa myndina av, at samkynd eru pínslaváttar. Ja, upprunin til allan jammurin er ofta als ikki samkynd fólk, men journalistar, sum vilja kenna seg sum stríðsfólk fyri rættvísi.

Stundum hevur ein fingið ta fatan, at samkynd bara hava verið statistar – ella offur! – hjá hesum journalistum...

**Tape fyri munnin...**

Tað ringasta av øllum var, tá samkynd í síðstu viku, við tape fyri munnin, mótmæltu uttan fyri tinghúsið. Boðskapurin var, at tað var so synd í teimum, tí tey verða tagd burtur.

Ja! *Tagd burtur*!

Eisini málið um skrásett parlag verður tagt burtur søgdu tey.

Yes! *Tagt burtur*!

Hóast samkynd eru nógv mest umrøddi bólkur í landinum! Hóast skrásett parlag er okkara mest umrødda politiska mál!

Kortini stóðu tey har. Við klistri fyri munnin. Tí tey og teirra viðurskifti verða tagd burtur! Tað var so patetiskt, at ein fekk næstan ilt.

Men so langt út kann ein also koma, tá offurrollan verður dyrkað.

Tað bleiv eisini sagt, at allir limir í nýggju samgonguni skulu hava skrivað undir eina avtalu um, at skrásett parlag ikki skal takast upp á tungu í fýra ár. Hóast eingin hevur sæð hesa avtalu...

**Gagnaði bert mótpartinum**

Friðarboðin, sum áður hevur savnað hundraðtals fólk til positiv tiltøk, savnaði bara nøkur fá tandur til hesa dyrkanina av leiklutinum sum offur í føroyska samfelagnum.

Men riddararnir á teimum hvítu hestunum – journalistarnir – vóru sjálvandi upp á pláss! Mótmælistiltakið fekk velduga umrøðu – bæði áðrenn og aftaná.

Spurningurin er so: Hvørjum gagnaði tiltakið?

Well, tað gagnaði sjálvandi teimum samkyndu, sum eru farin at dyrka sína offurrollu. At so fá møttu upp, gjørdi sjálvandi tiltakið enn meiri væleydnað í so máta. Hygg, kunnu tey nú siga: Hini tíma ikki ein gang at møta upp, tá vit mótmæla!

Tað gagnaði eisini journalistunum, ið kundu dyrka sín heroiska leiklut sum verji teirra veiku.

Men fyrst og fremst gagnaði tað teimum, sum ikki vilja, at samkynd skulu verða partur av okkara samfelag. Tí eru fordómarnir móti samkyndum sterkir í Føroyum, so verða teir enn sterkari av einum so býttisligum tiltaki.

Og at stíga fram sum samkyndur í Føroyum verður sjálvandi enn truplari, tá felagið hjá samkyndum sjálvt manar fram ta mynd, at samkynd eru offur, sum øll onnur skulu taka synd í.

**Størstu fíggindarnir**

So góðu tit: Haldið nú kjaft við hesum grenjinum!

Latið verið við at dyrka hesa offurrolluna! Hon gagnar tykkum ikki! Hon ger bara støðuna hjá samkyndum truplari, enn hon er.

Og ansið eftir hesum frelstu journalistunum, sum vilja hava tykkum at vera neyðarslig offur, so teir kunnu spæla mannarættindastríðsmenn við at tosa um tykkum. Tit hava nógvar fíggindar – men hesir journalistar eru kanska teir ringastu.

Fjølbroytni er gott fyri okkum. Men tað krevur dirvi at vera øðrvísi í einum lítlum samfelag. Verið stolt av, at tit hava hetta dirvi! Og vísið stoltleikan! Verið fyrimyndir hjá teimum helst mongu samkyndu føroyingum, sum ræðast sín egna samleika. Og ansið eftir, at teir ikki fara at ræðast hann enn meira.

Vísið, at tit ikki lata tykkum kúga av fordómum og fordømingum. Bara soleiðis kunnu tit vinna á teimum.

Handa dagin á tinghúsvøllinum ikki bara lótu tit tykkum kúga – tit kúgaðu tykkum sjálv.

# Loysingartrøll í Sosialinum?

**Týsdagin hevði Sosialurin eina oddagrein um Kosovo, sum kallaðist "Loysing." Eg havi lisið hana fleiri ferðir, og spyrji – hvat er politiska dagsskráin hjá Sosialinum í hesum máli?**

ROLF GUTTESEN



Mesta av greinini er lýsing av teim reellu trupulleikunum, sum hava verið á Balkan í mong ár. Men knappliga skiftir greinin fokus, og endar við at nevna, at Danmark stuðlar "fullu loysingini hjá Kosovo." Og so brestir bumban í allarseinasta setningi: "Sum heild stuðlar Danmark loysingarrørslur, soleingi hesar ikki virka innan danska ríkisfelagsskapin." Hetta er ein alvorlig sak, góði Sosialur. Tí hatta er skeivt, enda í annan! Tit bera falskan vitnisburð!

**Hvat er so galið?**

Fyrsta: Tit skilja ikki millum loysingarrørslur og frælsisrørslur.

Annað: Tit siga "…so leingi hesar (loysingarrørslur)r ikki virka innan ríkisfelagsskapin"

Men er tað ikki líka mikið? Nei, og slett ikki tá Føroya kanska størsti miðil skrivar so.

**Eitt er frælsisrørsla**

Frælsisrørslur eru eitt. Til dømis FNL ella Vietcong í Vietnam, sum bardist móti amerikanskari herseting og imperialismu. Ella MPLA í Angola, sum blakaði portugisiska kolonivaldið út. PLO í Palestina vil hava sítt gamla land aftur frá einum hersetingarvaldi, ið eitur Ísrael. Men hvør hevur mesta rættin har? Hópur av dømum kundu verið nevnd.

**Annað er separatistrørsla**

Loysingar- ella separatistrørslur virka oftast fyri at býta partar av verandi statum frá. Og her eru nógv søgulig, politisk og national atlit at taka, tá dømast skal um rætt og skeivt. ETA í Norðurspania, er dømi um separatistrørslu. Danmark stuðlar ikki ETA. Ger Sosialurin? Liga Norte í Italia er eisini separatistrørsla. Tshombe í Katanga í Congo var separatistur, sum gekk ørindi hjá imperialistum. ST, Danmark og helst Sosialurin var ímóti. Sama var við Biafra í Nigeria. Hópur av skitnum dømum kundu verið nevnd.

Tað ljóðar, sum Sosialurin per definitión heldur, at separatistrørslur eru í fínasta lagi. Er tað í lagi, at turkar hava sín egna loysingarstat á Norðurcypern? Var tað rætt, at sudetertýskarar loystu frá Tjekkoslovakia og komu "heim" til Týsklands? Skula sorbar í Týsklandi so hava sín egna stat?

**Støðan á Balkan**

Nú er støðan í gamla Jugoslavia og á Balkan óvanliga kompleks og vandamikil. Sum Sosialurin rætt skrivar, so hava fólkasløg og religiónir, hersetingar og ymiss søgulig stórveldir, kommunisma og fascisma sett síni djúpu spor har. Tað sum er politiskt rætt at gera har og nú, kann uppá ongan máta mekaniskt yvirførast til føroysk viðurskiftir ið við at gera gandaorðið loysing til nakað universelt gott. Og Danmark er ikki Serbia. Ansi eftir!

**Hvat meinar Sosialurin?**

Men er Danmark ímóti, tá tað kemur til ríkisfelagsskapin? Hvat meina tit við?

Eg haldi meg hava hoyrt fleiri statsministarar sagt, at um ein klárur meiriluti í Føroyum ynskir økt sjálvstýri ella kanska loysing, so eru tað føroyingar, ið velja. Sama er uttan nakran iva galdandi fyri Grønland. Tit eru á skeivari leið, tí hatta eru politiskt ósannindir.

**Støðan í Føroyum?**

Hava føroyingar (og grønlendingar) ikki tað heima- ella sjálvstýri, sum teir hava samrátt seg fram til? Er ynski um meira sjálvstýri, so er at semjast um hesi ynski fyrst og so at samráðast. Fingu íslendingar, sum til 1944 vóru partur av ríkisfelagsskapinum, ikki fullveldi á friðarligan og væl skipaðan hátt? Har var greiður meiriluti fyri fullveldi, eini 93% minnist eg rætt.

Vónandi er loysunarorðið hjá Sosialinum ikki: full ferð fram við øllum separatistum. Tí um Verðin verður býtt upp í smástatir til støddar sum Føroyar, so eru leysliga roknað hundrað túsund (100.000) statir í Verðini. Eg haldi, at tað ljóðar bæði kaotiskt og órealistiskt. Men í hesum føri haldi eg bestu loysn vera, at Kovovo verður viðurkent sum suveren republikk.

Lesið Sosialin -so eru tit við!